umhvørvisstovan

Elfelagið Sev
Postbox  319
Landavegur 92
110 Tórshavn
Føroyar

Argir hin 21. august 2026
Málsnr.: 24/06313-16
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Katrin Haraldsdóttir Jensen

**Góðkenning av umsókn um at leingja tíðarfreistir fyri royndarverkætlanir fyri sjóvarfalsorkuverk í Vestmannasundi**

Umhvørvisstovan góðkennir, at tíðarfreistin fyri góðkenningar av umhvørvisárinsmetingum frá 31. mars 2020 og 12. september 2023 fyri sjóvarfalsorku-verkætlanir hjá SEV í Vestmannasundi verður longd til 28. februar 2030.

Avgerðin er tikin sambært § 21 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum og § 16 í elveitingarlógini, og er avgerðin grundað á umsókn frá SEV, alment kunngjørdu umhvørvisárinsmetingunum og viðgerð av hoyringarsvarum.

Henda góðkenning er einans ein leingjan av verandi royndarloyvum, nýggj árinsmeting er ikki gjørd fyri sjóvarfalsorkuverkini.

**Upplýsingar um málið**

Umhvørvisstovan góðkendi tann 31. mars 2020 umhvørvisárinsmeting fyri royndarverkætlan at seta tvey sveimandi sjóvarfalsorkuverk (drekar) á 100 kW út í Vestmannasundi. Harumframt góðkendi Umhvørvisstovan tann 12. september 2023 umhvørvisárinsmeting fyri royndarverkætlan við einum størri sjóvarfalsorkuverki (dreka) á 1,2 MW á øðrum stað í Vestmannasundi. Í báðum góðkenningum vórðu settar ávísar treytir til verkætlanirnar, og vóru góðkenningarnar tíðaravmarkaðar til tvey ár.

Eftir umsókn frá SEV tók Umhvørvisstovan tann 26. november 2021 avgerð um at leingja tíðarfreistina fyri fyrru góðkenningina fyri smærru 100 kW-drekarnar til 28. februar 2025.

Í oktober 2024 sendi SEV Umhvørvisstovuni teldupost, har gjørt varð vart við, at SEV væntandi fór at søkja um at leingja tíðarfreistina fyri góðkenningina av smærru 100 kW-drekunum. Spurt varð um hvat tilfar skuldi sendast Umhvørvisstovuni í sambandi við umsóknina.

Umhvørvisstovan svaraði fyrispurninginum tann 27. november 2024.

Tann 12. februar 2025 boðaði SEV frá, at alt tilfarið til umsóknina ikki var klárt og spurdi, um tað var møguligt at leingja tíðarfreistina fyri góðkenningina fyribils. Umhvørvisstovan gekk umsóknini á møti og longdi fyribils tíðarfreistina í tríggjar mánaðir.

Umhvørvisstovan fekk tann 4. apríl 2025 umsókn um at leingja tíðarfreistina fyri góðkenningina til smærru 100 kW-drekarnar við 5 árum. Eisini varð søkt um at leingja tíðarfreistina fyri góðkenningina til størra 1,2 MW-drekan, so tíðaravmarkingin fyri góðkenningarnar endar samstundis. Við umsóknini sendi SEV tilfar og upplýsingar, sum Umhvørvisstovan hevði biðið um. Hetta fevnir m.a. um frágreiðingar og úrslit um gongdina við verkætlanunum í Vestmannasundi og um ymsar skrásetingar og kanningar, sum eru gjørdar sambært treytunum í góðkenningunum av umhvørvisárinsmetingunum.

Í umsóknini stendur eisini, at bæði Minesto og SEV síggja royndirnar í Vestmannasundi sum eina og somu verkætlan, har tøkni, staðseting og luttakandi partarnir eru stórt sæð teir somu, og tí fevna kanningar eisini um báðar royndarverkætlanirnar.

Tann 6. mai 2025 var fundur millum Umhvørvisstovuna, SEV, Minesto, og Havstovuna um arbeiðið við royndarverkætlanunum og teimum kanningum, sum eru gjørdar fyrstu fimm árini. Umrøtt varð m.a., hvussu farast skuldi fram, um umsóknin um at leingja tíðarfreistirnar var góðkend, framhaldandi kanningar av fugli, hvali og kópi, og um kanningar av óljóði frá drekunum í Vestmannasundi.

Grundað á, at tíðarskeiðið fyri royndarverkætlanina aftur verður longt munandi, at treytirnar í báðum góðkenningunum eru sera líkar og at royndirnar í Vestmannasundi tí kunnu síggjast sum ein samlað verkætlan, hevur Umhvørvisstovan í hesi avgerð samanskrivað treytirnar í góðkenningunum av umhvørvisárinsmetingunum og gjørt tillagingar í treytunum samsvarandi longdu tíðarfreistini. Hetta so at somu treytir eru galdandi fyri alt virksemið, bæði størra og smærru drekarnar, og so at tað er einfaldari at hava eftirlit við, at treytirnar verða hildnar.

**Hoyring**

Umhvørvisstovan sendi uppskot til avgerð til hoyringar hjá SEV, Vestmanna kommunu og Vága kommunu tann 19. september 2025. Hoyringarfreistin var 17. oktober 2025.

SEV og Vága kommuna høvdu ongar viðmerkingar.

Tann 2. oktober 2025 fekk Umhvørvisstovan teldupost frá Vestmanna kommunu, har spurt varð, um kommunan var hoyringarpartur. Kommunan greiddi frá, at kommunan hevði kært upprunaligu royndarverkætlanina til Føroya kærustovn, sum metti, at Vestmanna kommuna ikki var partur í málinum og tí ikki hevði kærurætt.

Umhvørvisstovan sendi tann 15. oktober svar til Vestmanna kommunu. Umhvørvisstovan greiddi frá, at tað er vanlig mannagongd hjá Umhvørvisstovuni at senda góðkenningar fevndar av § 16, stk. 1, í elveitingarlógini og § 21, stk. 1, í løgtingslóg um vernd av havumhvørvinum til hoyringar hjá viðkomandi kommunum. Hetta verður gjørt fyri at upplýsa málið, so at avgerðin um góðkenning verður tikin á so góðum grundarlagi sum gjørligt, og at Vestmanna kommuna tí var vælkomin at senda Umhvørvisstovuni ítøkiligar viðmerkingar. Upplýst varð eisini, at tað at Umhvørvisstovan hoyrir kommununa í hesum málinum, ikki viðførir, at kommunan er partur í málinum, tá ið tað kemur til kærurætt. Hetta er upp til kærumyndugleikan at avgera, um so er, at avgerðin verður kærd.

Tann 13. november sendi Vestmanna kommuna hoyringarsvar til Umhvørvisstovuna, har sagt varð, at vinnu- og havnarnevndin metti, at royndarverkætlanin kemur at hava ávirkan á siglingina inn á Vestmanna, um tað ikki verður loyvt at sigla ígjøgnum royndarøkið. Vestmanna kommuna skeyt upp, at dýpið niður á drekan í kyrrindum verður minst 12 m, og at kassin/royndarøkið verður opið fyri allari sigling. Harafturat varð víst á, at borgarar í Vestmanna kommunu missa enn eitt fiskimið orsaka av verkætlanini.

Hesar viðmerkingar eru viðgjørdar í góðkenningini av royndarverkætlanini við D12 drekanum í Vestmannasundi frá 12. september 2023. Umhvørvisstovan metti, at viðmerkingarnar frá Vestmanna kommunu viðvíkjandi dýpinum niður á drekan ikki vóru viðkomandi fyri ávirkan á náttúru og umhvørvið, og at hesi viðurskifti ikki eru fevnd av § 21 í havumhvørvisverndarlógini ella § 16 í elveitingarlógini. Umhvørvisstovan ger vart við, at tað er upplýst í umhvørvisárinmetingunum frá SEV, at dýpið niður á drekan er 8 m.

**Avgerð**

Umhvørvisstovan góðkennir, at tíðarfreistin fyri góðkenningar av umhvørvisárinsmetingum frá 31. mars 2020 og 12. september 2023 fyri sjóvarfalsorku-verkætlanir hjá SEV í Vestmannasundi verður longd til 28. februar 2030.

Avgerðin er tikin sambært § 21 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum og § 16 í elveitingarlógini, og er avgerðin grundað á umsókn frá SEV, alment kunngjørdu umhvørvisárinsmetingunum og viðgerð av hoyringarsvarum.

Henda góðkenning er einans ein leingjan av verandi royndarloyvum, nýggj árinsmeting er ikki gjørd fyri sjóvarfalsorkuverkini.

Niðanfyristandandi treytir eru galdandi fyri leingjan av tíðarfreistini fyri góðkenning av umhvørvisárinsmetingum fyri royndarverkætlanirnar við sjóvarfallsorku í Vestmannasundi:

1. At royndarverkætlanin er avmarkað til 28. februar 2030 og verður framd sum greitt verður frá í árinsmetingunum fyri verkætlanirnar og øðrum samskifti millum SEV og Umhvørvisstovuna.
2. Um royndartíðarskeiðið skal leingjast, skal tað góðkennast av Umhvørvisstovuni. Umsókn skal sendast Umhvørvisstovuni í góðari tíð frammanundan, tað vil siga í minst lagi 6 mánaðir frammanundan.
3. Verkætlanin skal fremjast soleiðis, at hon hevur minst møgulig árin á náttúru og umhvørvi.
4. SEV skal framhaldandi skipa fyri eygleiðingum av fugli í Vestmannasundi. SEV sendir Umhvørvisstovuni ætlanir fyri eygleiðingarnar.
5. SEV skal framhaldandi skipa fyri eygleiðingum av hvali og kópi í Vestmannasundi. SEV sendir Umhvørvisstovuni ætlanir fyri eygleiðingarnar.
6. SEV skal hava eftirlit við, um samanstoytir eru millum orkuverkið og kóp ella hval, og skal skráseta, um skaddur ella deyður kópur ella hvalur verður funnin í sundinum ella økjunum nærhendis.
7. SEV skal gera kanningar av óljóðinum frá drekunum, bæði tætt við drekarnar og í ymiskari frástøðu frá drekunum.
8. SEV ger eina verkætlan um, hvussu kópur frá látrunum nærhendis ferðast í økinum, og um hann verður ávirkaður av drekunum.
9. SEV skal tann 1. februar í hvørjum ári senda Umhvørvisstovuni eina frágreiðing um gongdina, eitt nú niðurstøður frá gjørdum kanningum, eygleiðingum o.ø.
10. Tá royndarverkætlanin er liðug, skal øll útgerð takast upp og beinast burtur við minst møguligum árini á náttúru og umhvørvi.

**Kæruvegleiðing**

Henda avgerð kann kærast til landsstýrisfólkið við umhvørvismálum og Føroya kærustovn. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, sum sendir kæruna til landsstýriskvinnuna við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí, at avgerðin er almannakunngjørd.

Møgulig kæra skal sendast við telduposti til us@us.fo ella til Umhvørvisstovuna, Traðagøta 38, 165 Argir.

____________________________ / ____________________________

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri